## Anna Rein

**Fra:** Anna Rein
**Sendt:** 10. juni 2020 12:54
**Til:** 'uvmr@uvmr.fo'; Herálvur Joensen; Pól Edvard Egholm
**Cc:** Joanna Djurhuus
**Emne:** Løgfrøðilig eftirkanning ísv. uppskot til ll. um br. i ll. um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19)

Til Umhvørvis - og vinnumálaráðið,

Løgtingsins umsiting hevur móttikið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19).

**Í sambandi við løgfrøðiliga eftirkanning eru hesar viðmerkingar:**

Í veruleikanum er ætlanin við hesum lógaruppskoti at fremja broytingar og harvið áseta reglur, ið natúrliga vildu verið reguleraðar í Epidemilógini kapittul 3, (Anordning nr. 655 frá 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt við bekendtgørelse nr. 180 frá 5. mars 2020), sum er danskt málsøki, sbr. § 1, stk. 2, nr. 7 í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, og lista A, nr. 4 í heimastýrislógini. Tað er tí rættiliga ivasamt, hvørt Løgtingið hevur lóggávuheimild á økinum.

Um hetta lógaruppskotið verður samtykt, kann spurningur setast við, um Løgtingið í roynd og veru hevur framt eina lutvísa yvirtøku av økinum: "Heilsumál", ella um Løgtingið ger seg inn á lóggávuheimildina hjá donskum myndugleikum.

Løgtingsins umsiting arbeiðir víðari við hesum spurningi og spurninginum um, hvørt lógaruppskotið er ella kann vera í stríð við Stýrisskipan Føroya, § 1.

Um tit hava spurningar til omanfyristandandi eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við undirritaðu/Løgtingsumsitingina.

Málsnummar og málsligar viðmerkingar verða sendar tykkum í serstøkum telduposti.

Vinaliga / Kind Regards

Anna Rein
Løgfrøðingur / Nevndarskrivari

LØGTINGIÐ

tel. +298 363906 • fax 363901 • postboks 208

annar@logting.fo logting@logting.fo www.logting.fo